# Vágbingar ikki komnir úr summarfrí



*Vágbingar fingu bank á Mølini á Eiði*

**Heimaliðið á Mølini gjørdi í fyrra umfarinum, sum teir vildu, og tað kundu teir ivaleyst eisini havt gjørt í seinna umfarinum, men tá vóru teir ikki sinnaðir at gera so nógv**

EB/STREYMUR-VB
*Jóannes Hansen*

Talan var ikki um met á Mølini á Eiði sunnudagin, men úrslitið var ikki av teimum mest vanligu. Hvørki hjá EB/Streymi ella VB. Vágbignar løgdu rygg til 6-1 tap. Tað hava teir ikki gjørt síðani teir á útivølli í 2002 taptu 6-0 á útivølli móti B36.

EB/Streymur hevur bara eina ferð vunnið so stóran sigur áður, sum teir gjørdu hesa ferð. Tað var í fjør, tá ið teir vunnu 7-0 á heimavølli móti ÍF.

Hvussu stórur sviðin hjá vágbingum er, eftir at teir hava mist Símun Samuelsen, ber ikki til at siga eftir ferðina á Mølini. Har var støðan so mikið vánalig hjá VB, tá ið fyrra umfarið var hálvrunnið, at tað ber illa til at ímynda sær tað verri.

Í 24. minutti økti EB/Streymur til 4-0. So var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða.. Undan steðginum fingu teir eitt mál afturat, og tá ið teir sjey minuttir eftir steðgin vunnu teir í tenis hugtaki fyrsta sett við eggi, lúrdi møguleikin fyri orduligum skrædli.

Soleiðis endaði tað ikki. Men tað var ikki VB, sum megnaði at spenna seg út og at svara aftur.Vágbingar tóktust framvegis at vera í summarfrí, og serliga í 1. hálvleiki var tað heilt galið á miðvøllinum, tá ið tað ráddi um verjukenda partin.

Heldur var tað heimaliðið, sum meiri ella minni gav uppat at spæla. Stigini vóru komin innanborða, málmunurin var góður, og heldur enn ágangandi spæl og harvið møguleikar fyri uppaftur fleiri málum og uppaftur størri sigri, so var talan um sunnudagshugna í góðveðrinum.

## Málini

Higartil í ár hevur tað verið ógvuliga soltið hjá Sonna L. Petersen og Sorini Anghel, sum í fjør vóru toppskjúttar.

Hesa ferð fingu teir báðir væl upp á loggið. Sorin, sum átjan minuttir undan leikloki fór av vøllinum, tí hann hevði fingið lítlan snudd, skoraði tvey tey fyrstu málini.

Piotr Krakowski hevði umskipað liðið nakað. Ronnie Samuelsen, sum skuldi vera við, gav avboð, tí hann hevði smávegis trupulleikar við lærkrikanum, og Brian Olsen, sum eisini skuldi vera við, hevði eisini givið avboð orsaka av skaða.

Hesa ferð var Bárður Olsen aftur undir liðini á Marna Djurhuus á sentrala miðvøllinum, og enn eina ferð vísti Bárður, at hann hevur fín fótbóltsevni. Knút Vesturtún, sum var í høgru á miðvøllinum, átti innleggið til fyrsta málið, sum Sorin Anghel stútaði framvið Bjarna Johansen.

Sorin átti eisini næsta málið, og tá vóru sjey minuttir afturat farnir. Eftir langt innkast frá Gert Hansen, royndi Bárður Olsen móti málinum. Bjarni Johansen hálvbjargaði, og Sorin var fyrstur á returinum.

Vágbingar vóru heitt tiknir, og tríggjar minuttir seinni var 3-0. Jóhann á Stongum sendi høgt og langt av vinstra vongverja. Álopsspælararnir høvdu drigið VB miðverjarnar við sær, og so var miðvallarin Bárður Olsen púra leysur, tá ið hann lyfti bóltin upp um VB málverjan.

EB/Streyma spælararnir vóru illa eftiransaðir. Teir hava góð fótbóltsevni, og teir spældu væl, men tað eigur at verða tikið við, at teir so at siga gjørdu, sum teir vildu. Í 24. minutti kom Sonni L. Petersen upp í part, tá ið hann økti til 4-0. Knút Vesturtún spældi av miðásinum og í høgru til Sonna L. Petersen, sum var púra blankur, tá ið hann setti framvið VB malverjanum.

Síðsta málið undan steðginum skoraði miðvallarin í vinstru Hans Pauli Samuelsen. Eftir langa sending inn um verjuna tøvdi Bjarni Johansen eitt vet. So var Hans Pauli fyrstur á bóltinum, og harvið var EB/Streymur á odda 5-0.

Sjey minuttir eftir steðgin royndi Sorin Anghel móti málinum. Bjarni Johansen hálvbjargaði, og Sonni L. Petersen var fyrstur á returbóltinum.

Eyðmýkingin mundi kennast ivaleysa stór hjá VB, sum legði fyri í 4-3-3 uppstilling, men síðani togaði meiri í bremsuna fyri at avmarka tapið. Anders Sørensen í miðverjuni vísti tað, sum tað kann roknast við. Annars var talan um offday so at siga yvir alla linjuna.

Tíbetur fyri VB minkaðu teir á heimaliðnum um ferðina. VB hevði onkra atsókn, og fýra minuttir undan leikloki eydnaðist tað Poul N. Poulsen at pynta um fyri VB, tá ið hann við góðum langskoti uttanvert brotsteigin sendi framvið René Tórgarð, sum ikki hevði havt so nógv at gera í EB/Streyma málinum.

## Fakta um dystin

**EB/STREYMUR-VB 6-1 (5-0)**
1-0: Sorin Anghel 7
2-0: Sorin Anghel 14.
3-0: Bárður Olsen 17.
4-0: Sonni L.Petersen 24.
5-0: Hans Pauli Samuelsen 40.
6-0: Sonni L. Petersen 52.
6-1: Poul N. Poulsen 86.
**EB/STREYMUR:** René Tórgarð - Gert Hansen, Egil á Bø, Andrej Pacek, Jóhann á Stongum - Knút Vesturtún (Esmar Eiðisgarð, 65.), Marni Djurhuus (Fróði Clementsen, 56.), Bárður Olsen, Hans Pauli Samuelsen - Sonni L. Petersen, Sorin Anghel (Arnbjørn Hansen, 72.)
**Gult kort:** einki
**VB:** Bjarni Johansen - Mortan úr Hørg, Suni úr Hørg, Anders Sørensen, Jákup Olsen - Edvard Ble (Jon K. Poulsen, 46.), Milan Kulic (Eyðstein í Lágabø, 80.), Nenad Zivanovic - Dan Djurhuus, John Poulsen, Poul N. Poulsen
**Gult kort:** John Poulsen
**Dómari:** Petur Reinert

## Claus fekk tríggjar minuttir

**Í Coventry vóru teir ógvuliga fegnir um, at tað eydnaðist at fáa eitt stig á útivølli í fyrstu royndini í nýggja kappingarárinum**

ONGLAND
*Jóannes Hansen*

Leygardagin varð farið undir nýtt kappingarár í næstbestu eingilsku deildini. Ein føroyingur luttekur í tí kappingini, men hansara leiklutur var ikki so ógvuliga stórur í fyrsta umfarinum.

Coventry legði fyri í torførum útidysti í Norwich. Heimaliðið legði seg framum í 1. hálvleiki, men tað eydnaðist teimum ljósabláu at javna í 2. hálvleiki til 1-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Claus Bech Jørgensen, sum fyrr í summar hevur gjørt nýggja avtalu við Coventry, var millum teir, sum venjarin, Micky Adams, hevði við í bussinum til Norwich. Claus hevur verið partur av liðnum í flestu venjingardystunum.

Hesa ferð var hann tó bara á vøllinum tríggjar teir seinastu minuttirnar. Tað man vera sjáldan, at føroyingar spæla í sínum feløgum frammanfyri so nógvum áskoðarum, sum Claus gjørdi leygardagin. 25.355 brúktu seinnapartin leygardagin til fótbólt í Norwich.

Í Onglandi liggja teir ikki á løtu síðuni. Longu í kvøld skal Coventry spæla aftur, og tað verður eisini á útivølli. Claus og teir skulu til Millwall.